**Hevur tú hug at læra grikskt í vetur?**

Í vetur hevur tú møguleika at læra nýtestamentligt (*koine*) grikskt á skeiði, sum Lívdin skipar fyri frá 4. januar til 31. mai 2010. Undirvísingin fer fram í tveir tímar mánakvøld, tilsamans 21 kvøld.

At læra grikskt krevur treysti og áhaldni, og tú skalt rokna við at skula gera skúlating einar fimm tímar um vikuna við t.d. at minnast orð og føll og gera uppgávur.

Enn er ikki avgjørt hvar skeiðið verður hildið tí vit mugu fyrst síggja hvaðani úr landinum fólk tekna seg, tó verður tað annaðhvørt í Eysturoynni ella í Havn

Tú verður neyvan grikskur serfrøðingur eftir nakrar fáar mánaðir. Men hetta er tað, tú kanst vænta tær av skeiðinum:
1) Tað fer at hjálpa tær bæði at skilja og meta um viðmerkingar til bíbilska tekstin
2) Tú fært eina hylling av, hvussu tað grikska málið er, og fert skilja tekstin betur
3) Tú fært eitt grundarlag, sum tú kanst byggja víðari á sjálvur, um tú vilt
4) Tú kanst lesa, greina og skilja tann lættara grikska tekstin av Nýggja Testamenti, so sum 1. Jóhannesar bræv og Markus.

Kostnaður: 650 kr.

Tey, sum ætla sær at koma, verða biðin um at keypa hesar báðar bøkurnar hjá William Mounce: *The Basics of Biblical Greek Grammar* (Second Edition frá 2003) og *Basics of Biblical Greek: Workbook* frá 2003. Hesar fáast á Logos bókhandlinum í Havn.

Um tú vilt vita meir, ella melda teg til, kanst tú seta í samband við:

Hallur Mortensen
Tlf. 316883
T-post: skarvur@gmail.com

ella

Jógvan Zachariassen
Tlf. 522212
T-post: jogvanz@olivant.fo

Tilmeldingarfreistin er 1. januar 2010.